# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Hornasteinurin í PISA

Spurningurin um undirvísingartilfar er nú aftur reistur. Og hóast lítið nýtt er at síggja í taltilfarinum, so er úrslitið framvegis eins skelkandi.

Tí hóast játtanin til Skúlabókagrunnin er økt nakað, so munar hetta so ógvuliga lítið, um grunnurin ikki megnar at avseta útgávur sínar til fólkaskúlan. Útgávur, sum teljast millum allar týdningarmestu liðirnar, tá um ræður at fremja lesiførleikan hjá føroyskum skúlanæmingum.

Og júst lesiførleikin er væl ein tann týdningarmesti parturin av lemjandi PISA-úrslitinum, sum var føroyska fólkaskúlanum fyri. Ein førleiki, sum er kanska týdningarmesta fortreytin, tá næmingar skulu nema sær aðrar førleikar enn teir, sum kunnu røkkast í fólkaskúlanum.

Og so hjálpir tað lítið at tosa um, at føroyskt undirvísingartilfar er ótíðarhóskandi og keðiligt. Føroyskar bókaútgávur eru seinastu nógvu árini vorðnar alt fleiri í tali, men megna skúlarnir við avmarkaðu fíggjarorku síni ikki at bera hesar inn um skúlagáttt, so er stórur partur av nyttuvirðinum í hesum farin fyri skeyti. Nyttuvirði, tí júst ein góður og sterkur bólkur av føroyskum rithøvundum og týðarum í eins stóran mun sum ein sterkur skúlabókagrunnur er fortreytin fyri góðum undirvísingaramboðum til fólkaskúlan.

Tí er tað ein áhugaverdur tanki, sum leiðarin á Skúlabókagrunninum enn einaferð kom við í sjónvarpskjaki í gjárkvøldi. Uttan at tað á nakran hátt skal merkja eina lækkan í játtanini til lærarалønir, so eigur samsvar at vera millum hesar og ta upphædd, sum verður nýtt til tey amboð, ið somu lærarar skulu nýta. So kann ágangurin móti lærarum okkara vera nóg so harður til tíðir, men fáa hesir ikki neyðugu amboðini, stríða teir í mangar mátar eitt nyttuleyst stríð.

**Sosialurin**

## Kirkjan og tey sjálvbodnu

**UNI NÆS**
biskupsvalevni



Vit hava lyndi til at hugsa, at Fólkakirkjan í Føroyum einans er prestarnir, men meginparturin av kirkjuliga arbeiðinum í Føroyum verður gjørdur av sjálvbodnum. Her hugsi eg um kirkjutænarar, kirkjuráðslimir og kirkjuligu felagsskapirnar.

Kirkjan eigur at varða sera væl um hesi sjálvbodnu, sum hvørja viku gera eitt ómetaliga stórt kirkjuligt arbeiði. Uttan hesi hevði kirkjan verið fátæk.

Eg vil arbeiða fyri, at vit framhaldandi hava nógv sjálvboðin í kirkjuliga arbeiðinum. Vit skulu ikki einans hava lønt fólk at gera tænastu, men framhaldandi kalla fólk at gera óløntar tænastur. Á størru plássunum eru kirkjuligu handlingarnar tó so mikið mangar, at har eiga kirkjutænarar at fáa samsýning fyri sítt arbeiði í kirkjuni. Veri eg valdur biskupur, vil eg ganga á odda fyri at stuðla kirkjutænarum og kirkjuráðslimum í tænastuni, og vera teirra viðspælari. Skipað útbúgving/ eftirútbúgving eigur at vera skipað til ymisku tænasturnar.

Eg vil eisini arbeiða fyri at styrkja samstarvið við kirkjuligu felagsskapirnar. Heimamissiónin, Kirkjuliga Missiónsfelagið, KFUM, KFUK, Skótarnir og Blái Krossur gera á hvør sín hátt eitt sera gott, fjølbroytt og týðandi arbeiði í kirkjuni, serliga millum børn og ung. Hesir felagsskapir eiga mína stóru virðing. Eitt skipa samstarvsráð fyri leiðsluna í kirkjuni og leiðslurnar í kirkjuligu felagsskapunum eigur at vera sett á stovn.

## Sandoyartunnilin einaferð enn Øll orsøk til at vera firtin, Trygve!

**BIRGIR MOHR**
Sandur



Nei góði harra Guttesen, eingin orøk er til at vera hátíðarligur í hesum máli, men øll orsøk til at vera firtin. Og tað er ikki bara eg, sum eri firtin, men helst øll 1500 fólkini í Sandoyar sýslu og hartil ein fittur partur av føroya fólki. Og tað er væl grundað.

Og tað er tí, at landsstýrismaðurin hjá Sambandsflokkinum ímóti samgonguskjalinum sigur seg virka fyri, at Sandoyartunnilin ikki verður bygdur nú. Og hettar sigst vera orsøkin til, at verklagslógin herum ikki er løgd fyri Føroya Løgting. Og eingin saklig orsøk er fyri tí.

Meira ítøkiligur er eingin orsøk til at vera, tí okkara fólk - føroya fólk - evnar at hugsa sjálvt. Og tey, sum fylgja við, vita, at undanførslurnar, sum fyrst vóru góði búskapurin - eru bert lótir, tí nú skulu peningurin nýtast til bleyt virðir í Tórshavnar økinum - har fíggjarmálaráðharrin stillar upp. Hví ikki steðga onkrari íløgu í miðøkinum???

At Sambandsflokkurin einaferð enn steðgar útviklinginum við at binda oyggjarnar saman er ein vánaligur og skeivur politikkur. Vit minnast øll, tá sambands løgmaðurin seint í nítiárunum koyrdi landsstýrismannin hjá sjálvstýrisflokkinum frá, tí hann vildi virka fyri Vága-tunlinum? Men hesin kom atlíkavæl - tí vit sluppu av við sambandsløgmannin. Tá var grundgevingin hjá sambandinum: ringar fíggjarligar tíðir, nú er tað ov góðar fíggjarligar tíðir?

Nær fer sambandi at tora? Og hví vil sambandi einki uttanfyri Streym- og Eysturoy?

Tá so sambands-tingformaðurin nú vil sentralisera alla valskipanina og harvið spreingja samgonguna av egnum áhugamálum við ivasomum heimildum, ja so er hettar aftur boð um at styrkja ta frammanundan sterka miðøkið í Føroyum! Og útjaðarin verður enn veikari.

Og tosið um ikki at útbyggja vágaflogvøllin, men ístaðin byrja á Glyvurnsnesi, ber boð um tað sama. Veit ikki, um Sambandsflokkurin eisini er fyri hesum?

Teir einfaldu spurningarnir, sum tú setur fram, kanst tú biðja ein skúlaflokk í Tórshavn um at svara tær upp á. Í politikki - sum í so mongum øðrum av lívsins viðurskiftum - ræður um at kunna hugsa og vera frammanfyri, áðrenn tær skeivu avgerðirnar vera tiknar. Hettar manst tú helst eisini skilja, Trygve Guttesen - um ikki, so gerst ikki við.

Men at billa okkum inn, at vit fíggjarliga og búskaparliga noyðast at lata vera við at útbyggja samanbindingina av Føroyum við tunlum, tað eru tær beru lótir - sambandslótir, tí Sambandsflokkurin eftir øllum at døma heldur vil útbyggja í miðføroyum, enn tann í samgonguskjalinum avtalaða tunnilin til eina útoyggj - Sandoynna og harvið hálvan vegin til eina aðra útoyggj, Suðuroynna. Og hettast hóast øll síggja, at menningin og útviklingurin av samfelagnum er steðgaður upp um Skopunarfjørð.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.